Zlatan leggur líka í FIFA-prís

Í síðstu viku kunngjørdi FIFA tey 30 nøvnini, sum hava møguleika at vinna heitið sum ársins spælari 2007. Á listanum vóru flestu av heimsins bestu spælarum at finna, men nógv saknaðu svenska landsliðsspælaran, Zlatan Ibrahimovic, á listanum. Serliga í Svøríki fekk hetta nógva umtalu, men Zlatan sjálvur leggur ikki so nógv í hetta. – Eg vildi fegin vunnið ein slíkan prís, men eg kann jú ikki gera nakað við tað. FIFA tekur avgerina, og sum eg segði í síðstu viku, so eri eg rættilga líka glaður.

– Ferguson hevur verið ein stór hjálp

Eftir ein langan dyst ímóti nógvum pørtum eydnaðist tað hjá Alex Ferguson og Manchester United at fáa lítla argentinaran, Carlos Tevez, til felagið síðst í august mánaði í ár. Ferguson hevur leingi havt eitt gott eyga á evnunum hjá Tevez, og tí var venjarin glaður um at fáa spælaran til United. Og Tevez sjálvur er eisini ógvuliga glaður fyri ta hjálpina, sum hann hevur fingið frá Ferguson. – Hjálpin, sum eg havi fingið frá Ferguson, hevur verið sera týdningarmikil. Hann trýr upp á meg, og hetta eri eg fegin um. Eg havi longu nú lært nógv av honum, hann fær meg at slappa av, og eg føli, at felagið setir prís upp á mínar dygdir.

Svart upp á hvítt í Skákinum

Skákið í miðbýnum í Klaksvík

TALVTEIGURI
Ólavur Simonsen

Kjølbro Open,ið er heitið á talvkapping, varð avgreidd í Skákinum um vikuskiftið

Klaksvíkar Talvfelag hevur í mong ár gingið heimleyst, har flutt varð millum Klaksvíkar Sjómansskúla og HF skúlan. Í 1995 hendi tað frálíka, at Klaksvíkar Komm-una veitti talvfelagnum eini hús, ið teir høvdu brúkt til rørgoymslu.

Húsið liggur mitt í býnum, men tað, sum er vert at bíta merki í, er, at húsið er smíðjað soleiðis, at eingin vinkul í húsinum er rættur.

Tá talvfelagið so skuldi húsast har, var tað sera hóskandi at kalla húsið Skákið.

Kjølbro Open

Nú stjóraskifti er farið fram á Kjølbro Heilsølu, har ein fyrrverandi føroyameistari loysti ein annan telvara úr starvi, er tað kanska ikki so løgið, at Kjølbro Heilsøla valdi at stuðla kappingini.

Kappingin varð skipað sum partur av Grand Prix kappingini, ið telur nýggju kappingar, har teir ovastu fáa GP stig. Telvað vórðu 5. umfør, har tíðin til talvini var 90 minuttir, og 30 sekund vórðu løgd afturat hvørjum leiki.

Havnamaðurin Herluf Hansen streyk avstað undan hinum telvarunum og lá eitt heilt stig á odda áðrenn seinasta umfar. Tá møtti hann Finnbirni Vang, ið mátti vinna talvið, um hann skuldi fáa nakað burtur úr kappingini.

Finnbjørn kastaði alt tað, hann kundi í talvið og vann eitt sera flott tekniskt endatalv. Við sigrinum gjørdust tríggir javnir á fyrsta plássinum: 1-3. Finnbjørn Vang 1-3. Herluf Hansen 1-3. Ólavur Simonsen

Breiddin og elitan illa umboðað

Tað kann lættliga sigast, at fáir av elitutelvarunum eru at síggja á luttakaralistanum. Um tað er fjallgongan, sum heldur monnum burtur ella okkurt heilt annað, er ilt at siga.

Umstøðurnar vóru góðar, virðisløninrnar góðar, og kappingin fevndi bert yvir eitt vikuskifti. Tó var hetta ikki nóg mikið til at lokka teir tungu dreingirnar út úr holunum.

Unglingarnir trúfastir

Tað hevur víst seg tey seinastu árini, at tað oftast eru unglingar, sum manna kappingarnar. Soleiðis var eisini í vikuskiftinum, har helmingurin av telvarunum vóru unglingar.

Hetta er bæði gott og ringt. Tað góða er at síggja ágrýtnar unglingar í menning, meðan tað ringa er, at teir sleppa ikki at telva móti royndum telvarum. Eisini er ein trupulleiki, at teir fáu royndu telvarnir, sum luttaka, møta unglingunum tey flestu umførini og fáa ikki ta neyðugu mótstøðuna. Hetta seinna drepur hugin hjá teimum fáu virknu royndu telvarunum, og tí er spurningurin, hvussu leingi teir tíma at halda áfram at luttaka.

So enn einaferð var tað svart upp á hvítt, at luttakaratalið ikki var nøktandi.

Bogi skeyt við skørpun

Bogi Hansen, ið er ein av mongu talentunum, ið Klaksvíkar Talvfelag hevur í løtuni, fekk eitt fjórða pláss við 3,5 stigum av 5. Hann gjørdist tí besti unglingin í kappingini, og vann eisini ratingvirðisløninа. Serliga var tað sigurin móti roynda Tummas M. Sólsker, ið gav honum eitt skump upp eftir stigatalvuni.

Tað er eisini áhugavert, at út av 12 virðisløunum, ið er latnar seinastu tvær kappingarnar, eiga klaksvíkingar 9!

Samlaða støðan í Grand Prix kappingini eftir tvær kappingar er:

Ólavur Simonsen	11,33 GP
Finnbjørn Vang	11,33 GP
Herluf Hansen	6,33 GP
Jón Andreasen	4 GP
Carl E. N. Samuelsen	3 GP
Bogi Hansen	2,5 GP
Vagn Heldarskarð	2,5 GP
Terji Petersen	2 GP
Rógvi Dragaberg	0,5 GP
Jaspur T. Gaard	0,5 GP

DEKKMASTER.FO
...tá ið prísurin eisini er avgerandi!
Sprint skutari
Giantco Sprint er ein nútímans skutari við øllum hentleikum.
Ein kvalitets-skutari fyri lágprís!
EINANS 13.900,-

www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000

DEKKMASTER.FO
...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

Vetrardekk
Michelin Alpin A3
175/65-14: 860,-
185/65-15: 960,-
195/65-15: 990,-
205/55-16: 1.350,-
Goodyear Ultra Grip 7
175/65-14: 910,-
185/65-15: 940,-
195/65-15: 980,-
205/55-16: 1.375,-
Continental TS810
175/65-14: 880,-
195/65-15: 1.010,-
205/55-16: 1.460,-
Roadstone Eurowin
175/65-14: 680,-
185/65-15: 790,-
195/65-15: 810,-
205/55-16: 960,-
www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000